

*Stílurin er bæði smartur og stórsligin, tá trinið verður inn um dyrnar í nýggju hølunum hjá Kaupthing*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Kaupthing í nýggj høli

**Stóri vøksturin hjá fyritøkuni krevur bæði rúmligari høli og betrað kundaviðurskifti. Nakað sum stjórin metir seg hava rokkið í nýggju hølunum í Bókbindaragøtu í Havn**

FLYTING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Mánadagin var talan um nýggjar arbeiðsumstøður hjá teimum 16 fólkunum, sum í dag starvast hjá Kaupthing í Føroyum. Eitt tal, sum hevur verið í støðugum vøkstri, síðani fyritøkan byrjaði føroyska virksemið í 2000.

Tá vóru starvsfólkini bara tvey í tali, og hølini við Tinghúsvegin tóktust vera ríkiliga stór til fyritøkuna. Eisini hóast roknast kundi við ávísum vøkstri.

Men góð fimm ár seinni hevur vøksturin væl og virðiliga yvirhálað gomlu hølini.

– Partvíst, so vóru karmarnir vorðnir ov treingir hjá okkum. Ikki minst, nú vit standa fyri enn eini størri víðkan í sambandi við bankavirksemið. Hartil, so vóru parkeringsviðurskiftini við Tinghúsvegin langt ífrá nøktandi. Í seinasta enda verður tað jú eisini kundin, sum merkir hesar trupulleikar, og tí eru vit sera fegin um, at vit nú hava loyst hesar trupulleikar, sigur Peter Holm, stjóri í Kaupthing Føroyar.

Og hann leggur eisini afturat, at hann er sera væl nøgdur um nýggju hølini.

– Vit hava í øllum førum lagt okkum eftir, at innrættanin skal taka atlit til, hvussu vit vænta at mennast framyvir. Og at hølini so eisini liggja væl fyri, er bara eitt pluss í so máta, sigur Peter Holm at enda.



*Opna skrivstovuumhvørvið við móttøkuna verður helst tað, sum kundarnir hjá Kaupthing í gerandisdegnum leggja best merki til*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**LEIÐARI TIL NONE-FOOD DEILDINA Í NÝGGJA MIKLAGARÐI SØKIST**

**TÍNAR ARBEIÐSUPPGÁVUR ERU:**
At keypa inn, prísáseta, seta vørur upp, gera og halda fíggjarætlan, og hava starvsfólkaábyrgd.

Best er, um tú hevur kunnleika til hetta starvsøkið, tú mást vera røkin, opin, og sera ágrýtin. Tú mást vera til reiðar at leggja eina rúgvu av orku og ómak í starvið.

Løn sambært avtalu.

**SEND SKRIVLIGA UMSÓKN TIL:**
Miklagarður Att: Johnny Priess, Postboks 1059, 110 Tórshavn

Eru spurningar, kanst tú ringja til Jonny tel. 28 30 11

MIKLAGARÐUR